# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Endar Irak í ruðuleika, fáa vit trupulleikar í økinum í mong ár frameftir*
*Henry Kissinger*

# Hon skal taka við eftir Putin

**Í russiskum fjølmiðlum verður Valentina Matvienko umrødd sum tann, ið skal taka við forsetaembætinum aftan á Vladimir Putin**



*Valentina Matvienko. Verður hon næsti forsetin í Russlandi?*

*Mynd: Reuters*

Amerikanararnir fáa kanska Hillary Clinton, og í síðstu viku valdu teir fronsku sosialistarnir Segolene Royal til forsetavalevni. Nú ljóðar, at russar fáa kanska eisini eina kvinnu í ovasta politiska embætið.

Hon eitur Valentina Matvienko og er guvernørur í St. Pætursborg. Sjálv sigur hon við norska blaðið Aftenposten, at tosið um hana sum forseta er ikki annað enn gitingar, men hon vil kortini ikki avsanna, at hon verður valevni á forsetavalinum í 2008.

- Tað er ikki lætt at siga, hvør verður forseti, men eg vænti, at russiska fólkið fer at velja tann besta, sigur hon við blaðið.

Russiska tíðarritið Novoe Vremja skrivaði í síðstu viku, at kanska eru tað ikki bara leysatíðindi, at Valentina Matvienko skal taka við eftir Putin. Blaðið sigur seg hava fingið at vita, at hennara stuðlar eru longu farnir undir fyrireikingarnar til valstríðið, og at málið er, at hon skal taka við leiðsluni í Kreml. Men sambært blaðnum er talan um eitt samstarv millum tey bæði, tí hevur blaðið rætt, skal Valentina Matvienko leggja frá sær aftur í 2012, so Putin kann taka við aftur.

Valentina Matvienko gjørdist virkin í sovjetska kommunistaflokkinum longu í sjeytiárunum, og í dag er hon tann fremsta kvinnan í russiskum politikki. Hon hevur verið sendiharri á Malta og í Grikkalandi, og við dyggum stuðuli frá Putin varð hon vald til guvernør í St. Pætursborg fyri trimum árum síðani.

Um tvey ár kann hon eisini fáa hansara stuðul, tá Russland skal hava nýggjan forseta.

# Kríggið í Irak kann ikki vinnast við hermegi

USA kann ikki vinna kríggið í Irak við hermegi, sigur fyrrverandi uttanríkisráðharrin Henry Kissinger.

Gamli uttanríkisráðharrin segði við BBC í gjár, at USA hevur ongan møguleika at vinna Irak-kríggið við hermegi longur.

- Tað letur seg ikki gera, segði hann. Hinvegin ávaraði hann USA ímóti at taka hermenninar úr Irak enn, tí eftir hansara tykki kann tað hava við sær, at viðurskiftini í grannalondunum verða ótrygg.



-Tað kann fáa álvarssamar avleiðingar, um Irak endar í einum ruðuleika, tí tá fáa vit trupulleikar, sum vit noyðast at stríðast við í mong ár frameftir, og sum fyrr ella seinni fara at noyða okkum at senda hermenn aftur hagar, heldur Kissinger.

Hann heldur, at USA og tess sameindu eiga at tosa við grannarnar hjá Irak fyri at fáa eina loysn. Sum eitt fyrsta stig eiga tey føstu limalondini í ST-trygdarráðnum at skipa fyri einari ráðstevnu saman við grannalondunum hjá Irak og londum sum India og Pakistan.

Fyrrverandi trygdarráðgevin og uttanríkisráðharrin hevur eisini virkað sum ráðgevi hjá George W. Bush, forseta.



*Henry Kissinger*

## STUTT SAGT

### Kvinnur í herin

Í nítiárunum setti norska stjórin sær fyri, at minst 15 prosent av landsins hermonnum skuldu vera kvinnur, men málið bleiv ongantíð rokkið. Nú tekur stjórnin málið uppaftur, og hesaferð er ætlanin, at í 2008 skulu minst 15 prosent av hermonnunum vera kvinnur. Í fyrsta umfari er ætlanin at vita, um herurin kann draga fleiri kvinnur til sín, men eydnast tað ikki, at Anne-Grete Strøm-Erichsen, verjumálaráðharri, til reiðar at tosa um, at kvinnur skulu hava herskyldu eins og menn. Tað hava talsmenn hjá herleiðsluni eisini skotið upp.

### Minni korn

Kornheystið royndist ikki so væl í Danmark í ár sum í fjør. Hagstovan í Keypmannahavn sigur, at sambært fyribilstølum heystaðu teir donsku bóndurnir 8,6 milliónir tons av korni í ár ímóti 9,3 milliónum tonsum í 2005. Tað var serliga várbyggið, sum sveik. Minkingin fær tó ikki stórvegis ávirkan á tað fíggjarliga úrslitið hjá bóndrunum, tí prísurin á korni hevur verið nakað hægri í ár enn í fjør. Nógvir bóndur stúrdu av álvara fyri korninum í ár, tí juli var sera turrur, men tað vísti seg at hava minni ávirkan enn væntað.

### Rósti Hitleri

60 ára gamli týski politikarin Klaus-Júrgen Menzel, sum umboðar tann høgrasinnaða flokkin NPD í landdegnum í Sachsen, segði í síðstu viku, at Adolf Hitler var ein stórur statsmaður. Hetta segði hann eisini í fjør, og tá skoytti hann uppí, at Hitler er kanska tann størsti statsmaðurin, sum Týskland hevur fostrað. Í dag vil eingin av hinum limunum í landdegnum hava nakað við Menzel at gera, og hann hevur fingið forboð fyri at møta á fundum har. Sætið í